# Miðflokkurin vil hækka pensjónina og geva øllum løn um børnini eru sjúk



*- Stættamunurin er nógv størri í ellisárunum enn í teimum árunum, tá fólk eru virkin á arbeiðsmarknaðinum, sigur Jenis av Rana*

**– Stættamunurin er størst í aldurdóminum, sigur Jenis av Rana, nú Miðflokkurin leggur tvinni uppskot fram fyri Løgtingið á ólavsøka. Annað uppskotið snýr seg um at hækka fólkapensjónina, og hitt snýr seg um løn, um ein er heima hjá sjúkum børnum**

POLITIKKUR
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin*

Miðflokkurin hevur lagt tvinni uppskot fram á tingborð, tá ið tingið kemur saman á ólavsøku.

Annað snýr seg um rætt til løn undir fráveru vegna sjúku hjá børnum, og hitt er um hækking í grundupphæddini til fólkapensjón.

Jenis av Rana, løgtingsmaður fyri Miðflokkin, sigur, at flokkurin hevur fingið áheitan frá Havnar Arbeiðsmannafelag um at gera okkurt við støðuna hjá teimum, sum missa løn, tá børnini eru sjúk, tí júst Havnar Arbeiðsmannafelag hevur limir, sum arbeiða avikavist í bæði tí almenna og privata sektorinum.

Jenis av Rana vísir á, at sømdirnar hjá teimum í almennum størvum eru munandi betri á hesum økinum. Hann sigur, at hetta er eitt beinleiðis átak frá almennari síðu, og tí ynskir fakfelagið eisini, at hinir limir felagsins, sum arbeiða hjá privatum arbeiðsgevarum, skulu sleppa at vera heima við løn hjá børnunum, um tey eru sjúk.

### Ikki roknað út enn

Jenis av Rana viðgongur, at Miðflokkurin ikki hevur roknað út, hvussu nógv hetta fer at kosta, men hann vísir á, at hetta er eitt uppskot til samtyktar. Tvs. at Miðflokkurin heitir á Landsstýrið um at kanna, "hvussu man við lóg kann tryggja øllum arbeiðstakarum eins rætt til løn, tá tey eru heima hjá sjúkum børnum, og at leggja fram løgtingslógaruppskot við hesum endamáli", sum tað verður orðað í uppskotinum. Støða er heldur ikki tikin til, um arbeiðsgevararnir skulu gjalda hesa løn til fólk, hvørs børn eru sjúk, ella um hetta skal skipast sum ein almenn veiting. Hetta skal verða ein partur av kjakinum í tinginum, sigur Jenis av Rana.

Spurdur, um hann sum andstøðutingmaður væntar undirtøku í tinginum fyri uppskotinum, sigur Jenis av Rana, at mundurin á hesum økinum er so eyðsýndur, at tað roknar hann við.

Hinvegin viðgongur hann, at mangan kann vera frustrerandi, sum hann tekur til, at sita í andstøðu í Føroyum.

Í fleiri øðrum londum verður roynt at taka andstøðuna við í breiðar semjur, men hetta hevur ikki verið beinleiðis siðvenja at gera í Føroyum. Jenis av Rana nevnir uppskotið hjá Tjóðveldisflokkinum um uppboðssølu av fiskiloyvum, sum herfyri varð "jarðað", sum hann sigur, av umboðum úr øllum flokkum í samgonguni. Hinvegin nevnir Jenis av Rana avtøkuna av einarættinum hjá tí almenna at gera útvarp og sjónvarp og Løgtingsins umboðsmann, ið tað tó hevur eydnast Miðflokkinum at fáa samtykt, hóast hann var í andstøðu.

### Fólkapensjónin hækka

Hitt málið, sum Miðflokkurin leggur fram fyri tingið á ólavsøku, er "Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum". Ella við øðrum orðum verður skotið upp at hækka fólkapensjónina.

Longu 1. januar 2007 skal fólkapensjónin sambært uppskotinum hækka 2000 krónur um mánaðin fyri støk og 1500 krónur um mánaðin tann 1. januar 2008.

– Hetta er stórt sæð ikki annað, enn tað samgonguflokkarnir lovaðu, sigur Jenis av Rana.

Í mun til tað fyrra uppskotið um løn, tá ein er heima hjá sjúkum børnum, hevur Miðflokkurin roknað út, hvussu nógv eitt slíkt uppskot fer at kosta. 3 ár fram í tíðina hevði hetta kostað 200 milliónir tilsamans. Jenis av Rana, at tað er bert eitt stað, pengarnir kunnu koma, og tað er sjálvandi úr landskassanum. Men hann kallar hetta ein spurning um umskipan, og nevnir í sama viðbragdi, at Føroya banki herfyri valdi at geva landskassanum eitt eyka vinningsbýti áljóðandi 600 milliónir.

– Hetta hevði verið nóg mikið til at fíggja okkara uppskot 10 ár fram, sigur Jenis av Rana, ið leggur afturat, at stættarmunurin er nógv størri í ellisárunum enn í teimum árunum, tá fólk eru virkin á arbeiðsmarknaðinum. Hann sigur, at hetta uppskotið ikki líkist tí, sum landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Bárður Nielsen hevur tosað um í seinastuni, har nevnt hevur verið, at fólk skulu gjalda umleið 15 % til at fíggja pensjónina í ellisárum við, tí uppskotið hjá Miðflokkinum snýr seg um pensjón úr landskassanum.

Jenis av Rana metir heldur ikki, at Samhaldsfasti arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin kann brúkast sum undanførsla, tí hesar pengarnar eiga fólk sjálv, sigur Jenis av Rana, ið heldur, at vit á pensjónsøkinum eru afturúrsigld í mun til okkara grannalond.

---

# – Fleiri stórmál næstu tingsetuna

**Løgtingið kemur sum vant saman ólavsøkudag, og løgtingsformaðurin væntar, at nógv stórmál verða viðgjørd hesa tingsetuna**

POLITIKKUR
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*



*Um viðgerðin av løgmansrøðuni ikki er liðug eftir ta ásettu tíðina, verður hon helst tikin upp aftur eftir orðaskiftið um fiskidagarnar*

Ólavsøkan nærkast, og sambært tingskipanini skal Løgtingið koma saman ólavsøkudag kl. 13, tá næsta tingseta byrjar.

Edmund Joensen, løgtingsformaður, væntar, at nógv stórmál skulu viðgerast og avgreiðast í heyst.

Tingsetan byrjar sum kunnugt við, at løgmaður heldur sína árligu løgmansrøðu. Av góðum grundum vita vit ikki, hvørji mál, løgmaður og hansara landsstýri hava valt at seta út í kortið, tí undan ólavsøku sita løgmaður, umsiting hansara og tey ymsu ráðini og viðgera tey mál, sum skulu við í løgmansrøðuna, ið skal snúgva seg um samfelagsgongdina, útlit, ætlanir og tílíkt.

Løgtingsformaðurin kennir tí enn ikki øll málini, ið helst verða løgd fram fyri tingið, tá tingsetan byrjar, men hann hevur hoyrt um nøkur mál í fjølmiðlunum, sum hann tekur til. Hann fær tó ein lista frá Landsstýrinum eftir løgmansrøðuna við hesum málum.

### Visjón 2015 og fiskidagar

Sjálvur væntar Edmund Joensen, at nøkur av stórmálunum, sum koma at fylla nógv í tingsetuni verða tillagingarmál ella lógartillagingar í sambandi við Visjón 2015. Eftir at løgmansrøðan er viðgjørd mikudagin og hósdagin í næstu viku, verður 1. viðgerð av uppskoti um vinnuligan fiskiskap. Her verða tann nógv umrødda fiskidagaskipanin viðgjørd, og hetta fer helst at taka fitt av tíð. Um viðgerðin av løgmansrøðuni ikki er liðug eftir hetta, verður hon helst tikin upp aftur eftir orðaskiftið um fiskidagarnar. Somuleiðis hevur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Bárður Nielsen, róð framundir, at pensjónsskipanir skulu broytast. Eitt nú hevur verið frammi, at heili 15 % skulu gjaldast til pensjón, og eitt slíkt mál væntar Edmund Joensen eisini fer at fylla nógv í løgtingsorðaskiftinum.

Harafturat hevur síðani 1998 verið arbeitt við yvirtøkuni av Fólkakirkjuni, og nú frættist úr Mentamálaráðnum, at lógaruppskotini til hesa yvirtøkuna eru klár at leggja fyri tingið, og hetta kann eisini koma at taka drúgva tíð, metir løgtingsformaðurin.

Tá slík mál verða løgd fyri tingið, avtalar formansskapurin í tinginum við Landsstýrið, hvussu uppbýtið av slíkum málum skal vera, tí um alt kemur í senn, verður formansskapurin noyddur at prioritera.

Mál, ið verða løgd fyri tingið skulu eisini hava eina ávísa framløgutíð í m.a. nevndum.

– Máini skulu vera "íligin", sum Edmund Joensen tekur til.

### Óljóð í tinginum

Onkuntíð hevur verið funnist, at tað er heldur nógvur ófriður í tinginum. Spurdur, um hetta er nakað, sum merkir tingarbeiði, sigur Edmund Joensen, at tað ger tað hvønn dag, men hóast tað meira enn so kemur fyri, at ringt verður við klokkuni, tá "smáfundir" eru millum tingfólk, so er talan um vaksin fólk og tí er trupulleikin ikki størri enn so, sigur tingformaðurin.

Hinvegin er akustikkurin í nýggja tingsalinum øðrvísi, enn hann var í tí gamla. Áður var eitt nú teppi á gólvinum, men nú er bert træ. Tingsalurin er eisini harður, av tí at bert jarn og træ eru í rúminum, so tað er skjótt, at hvørt óljóð hoyrist.

Onkuntíð hevur verið tosað um at útvega ljóðdoyvarar til tingsalin, men eingin ítøkilig ætlan er tó um hetta.